*– Tað er sjálvandi keðiligt, at vit ikki hava manga Leivur og Svein til dystin, men vit mugu bara klára okkum uttan*

*Jakob Jónsson, venjari hjá StÍF*

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# ÍTRÓTTUR




*SÍ hølvaði ÍF av á Kambsdali, og nú er at kalla púra javnt millum fýra lið í oddinum. Um SÍ vísir sama spæl komandi dystirnar, so kunnu tær røkka heilt langt í ár*

ÍF-SÍ 0-3 (23-25, 16-25, 14-25):

# SÍ blandar seg í oddin

**åSÍ vann tryggan sigur á toppliðnum, ÍF, í meistaradeildini hjá kvinnum í gjárkvøldi. Við sigrinum hevur SÍ tikið eitt stórt fet fram ímóti oddinum**

KVINNUFLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Undan dystinum lógu trý lið jøvn í oddinum í bestu kvinnudeildini við 12 stigum. Eitt av hesum liðunum er ÍF, sum í gjárkvøldið tók ímóti SÍ. Undan dystinum lá SÍ á fjórða plássi fýra stig aftanfyri oddaliðið, so tær kundu taka eitt stórt fet fram ímóti oddinum, um tær fingu ein sigur heim við av Kambsdali.

### Javnt fyrsta sett

SÍ legði eisini sera hart út á Kambsdali ímóti ÍF. Tað var púra greitt, at tær vóru væl fyrireikaðar til dystin, og ikki gekk long tíð, so hevði SÍ lagt seg á odda heili 2-8. ÍF kom tó betur við í dystin, og løtu seinni høvdu tær minka um munin niður í 9-13, og so tók ÍF dik á seg. Næstu løtuna hevði ÍF eina sera góða periodu, og seint í settinum høvdu tær vunnið seg fram um 22-18. Nú sá gott út hjá ÍF, men so steðgaði upp. SÍ kom væl við aftur, og sørvágskvinnur vunnu at enda fyrsta sett 23-25.

### Klassamunur

Var fyrsta sett javnt, so var gongdin ein heilt onnur í øðrum setti. Her setti SÍ seg veruliga á dystin, og ÍF hevði at kalla ongan møguleika. SÍ legði bragdliga fyri, og tær vunnu sær eina trygga leiðslu tíðliga í settinum. Tær høvdu sera góðar servar, sum løgdu stórt trýst á ÍF, og so var týðiligt, at tær vóru meir uppsettar til dystin. Harafturat var álopið sera gott og fjøllbroytt, og hetta skapti trupulleikar fyri annars sterku verjuna hjá ÍF. Her var stutt og greitt stórur munur á liðunum. Annað sett megnaði SÍ eisini at vinna. Úrslitið gjørdist 16-25.

Nú var støðan knappliga 2-0 til útiliðið, og nú sá ikki gott út hjá ÍF. Nú skuldi ÍF vinna restina av settunum, um tær skuldu hava møguleika at leggja seg einsamallar á odda í bestu kvinnudeildini. Men soleiðis bleiv ikki.

SÍ legði fyri sum eitt ódnarveður í triðja setti, og ÍF hevði ongan møguleika. Her var stutt og greitt klassamunur og liðunum henda dagin, og SÍ førdi allan vegin í triðja setti. Tær vunnu eisini ein knúsandi 14-25 sigur í hesum settinum, og so var liðugt á Kambsdali.

Hjá ÍF kann ikki sigast annað, enn at hetta var ein felags niðurtúrur. Allir leikararnir spældu illa, og tær høvdu ongan møguleika ímóti SÍ henda dagin. Hinvegin spældi SÍ ein sera góðan dyst. Alt riggaði hjá teimum, og tær vóru betri á øllum økjum. Servurnar vóru góðar, móttøkurnar lógu sera væl, og so høvdu tær eisini sera gott og fjøllbroytt álopsspæl, har allir leikararnir vístu stóra styrki. Annars kann leggjast afturat, at hevarin hjá SÍ, Annika á Stongum, spældi ein heilt ótrúliga góðan dyst. Hennara hevingar lógu sera væl, og hon vísti sannan landsliðsklassa í dystinum ímóti ÍF.

Sum heild ein tryggur sigur til SÍ, og um tær klára at halda fast um hetta spælið, so kunnu tær røkka heilt langt í ár.



## Cannavaro gjørdist bestur

Framman fyri Gianluigi Buffon og Thierry Henry varð Fabio Cannavaro í gjárkvøldið kosin sum ársins spælari í Evropa

Tað ljóðaði longu fyri fleiri vikum síðani, at heiðurin frá France Football skuldi fella til italska liðskiparan, men tað var so ikki fyrr enn í kvøld, at staðfestingin varð veruleiki. Cannavaro er fyrsti verjuspælarin, sum fær heiðurin, síðani Franz Beckenbauer vann heitið í 70'unum.

Vinnarin í fjør, Ronaldinho, gjørdist nummar fýra – bein framman fyri besta spælaran í HM, Zinedine Zidane.

## Fekk 28.000 fyri eina 10 krónu

Ein danskur veddari gjørdi av sonnum kvettið, tá hann um vikuskiftið veddaði 12 ymsar dystir. Samlaða oddsið av hesum var ikki minni enn 2.788,17, og tað gav veddaranum knappar 28 túsund krónur aftur fyri nýtti til seðilin. Teir 12 dystirnir vóru Tottenham-Wigan 3-1 (odds 1,65), Rangers-Kilmarnock 3-0 (1,30, OB-Rosenborg, 5-3 (2,75), Man Utd.-Chelsea 1-1 (2,95), Betis-Espanyol 1-1 (2,90), Santander-Recreativo 4-3 (2,20), Stuttgart-Glacbach 1-0 (1,35), Valencia-Real Madrid 0-1 (2,55), Belenenses-Porto 0-1 (1,45), Palermo-Inter 1-2 (2,30), Athl. Bilbao-Sevilla 1-3 (1,75) og Lyon-Auxerre 1-0 (1,25)